# Nú steðgar eingin Fleyr

*Flogbóltur: Skuldi nakar gera Fleyr ónáðir á veg móti meistaraheitinum, so skuldi tað vera Mjølnir. So var ikki, og nú er avgerðin fallin. Fleyr verður meistari hjá monnum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mjølnir-Fleyr 0-2

Undan hesum vikuskiftinum var tað bara eittans lið, sum hevði møguleika at gera Fleyr ónáðir á veg móti meistaraheitinum í meistaradeildini hjá monnum. Eftir at Fram tapti greitt móti Fleyr seinasta vikuskiftið, var tað bara Mjølnir, sum kundi leggja forðingar í vegin, men so varð ikki.

Dystin sum liðini leiktu í Klaksvík hetta vikuskiftið vann Fleyr, og tí kunnu vit staðfesta tað, sum hevur ligið í luftini í longri tíð, nevniliga, at Fleyr verður meistari í meistaradeildini hjá monnum.

### Ov stórur munur

Nú kappingin fer at nærkast endanum kunnu vit staðfesta, at tað í ár hevur verið alt ov stórur munur í landskappingini.

Longu frá byrjan legði Fleyr sjógv millum seg og mótstøðuliðini, og tá Mjølnir var amputerað í byrjanini av árinum, er tað ikki fyrr enn móti endanum av árinum, at teir hava blandað seg í stríðið í ovaru helvt.

Ilic var ov seinur til lands til at gera tann stóra munin, og hjá Fleyr, hevur tað so at siga gjørt tað sama um Romica var har ella ikki, tí hinir leikararnir á hansara plássi hava givið honum lítið eftir.

Tí hevur eingin spenningur verið um fyrstaplássi í landskappingini, men sig tða við Fleyrleikararnar, at tað hevur verið keðiligt ...

### Mjølnir má styrkjast

Hvussu verður hjá klaksvíkingum komandi ár, er ikki gott at vita, men tað er greitt, at kemur Ilic ikki aftur til lands, mugu teir hava annan styrk ætla teir sær at gera seg galdandi næsta ár.

Liðið er ov veikt til at hótta oddaliðini fáa teir ikki styrk, og tað eru teir uttan iva greiðir um í Klaksvík.

Seinna partin av kappingini hevur verið spennandi at fylgja Mjølnir. Bæði tí at teir heimligu spælararnir hava blómað, men so sanniliga eisini tí at Ilic, sum í orðsins rætta týdningi er ein jugoslavisk eldsál, hevur blást til føroyska flogbóltseldin sum fáur annar útlendingur hevur gjørt.

Kortini er tað kanska júst hann, sum hevur verið størsti trupulleikin hjá Mjølnir í ár. Teir hava dúvað ov nógv upp á hann, og hava kanska trúð ov lítið upp á egnan mátt. Tað hevur gjørt tað ov lætt hjá mótstøðuliðunum at byrgja upp fyri.

Nú hetta árið er avgjørt, bíða vit í spenningi eftir næsta kappingarári.

*Fleyr hevur víst klárt tað besta spæli í ár og tí er tað uppiborið, at teir gerast meistarar í ár. Einki av hinum liðunum hevur verið ein verulig hóttan fyri teir, hóast teir hava tapt onkran hálvleik*



# TB besta silvurboðið

*Flogbóltur: Tvørákvinnur vunnu torføra dystin móti ÍF á Kambsdali, og eru framhaldandi besta boðið upp á ein siluvrvinnara*

SVEINUR TRÓNDARSON

ÍF-TB 0-2

Fuglfirðingar høvdu nakað at prógva eftir tapið móti Fleyr seinasta vikuskiftið, meðan TB skuldi halda leiðina fram, fyri framhaldandi at vera besta boðið upp á ein silvurvinnara í hesum kappingarárinum.

Tað varð tað seinna sum eydnaðist og tískil er tað TB, sum situr við teimum bestu kortunum nú kappingarárið fer at halla.

### Avgera tað sjálvar

Fyri TB er tað at siga, at tað vera tær sjálvar, sum gera av, um tær skulu hava silvur, ella um tær vilja lata okkurt av hinum liðunum at sleppa framum. TB er tvey stig framman fyri Drátt og trý framman fyri Fleyr, men hava leikt ein dyst færri. Tí er teirra støða væl betri enn hon er hjá hinum liðunum og tað er lítið sannlíkt, at tær gloppa dyrnum fyri hinum.

Tað má sigast vera eitt sindur óvæntað, at TB er so ovarlaga í ár, hóast alt.

Tær mistu nógv fólk áðrenn árið byrjaði og tí var ikki væntandi, at tær skuldu fara at ger<a so nógv um seg, og vit stíga neyvan TB-ararnar á tærnar tá vit siga, at tær eisini hava dúva upp á missin hjá hinum liðunum.

Men tað er eingin skomm. Tað er í grundini ein góð styrki at hava, at ein dugur at vinna tá hini liðini ikki eru so góð, og tað er so teirra fyrimunur.

### ÍF bíðar til næsta ár

Fuglfjarðakvinnur fara uttan iva at brynja seg við tolið, nú tær enda hetta kappingarárið í niðaru helvt av stigatalvuni.

Heldur ikki tær hava nakað at skammast um, nú árið fer at halla. Tær hava gjørt sítt besta, og tað var bara spell, at tær ikki komu í gongd eitt sindur fyrr.

Tað er bert at vóna, at tær halda upp á tað fólki, sum tær hava í ár, tí so fara tær uttan iva at gera seg meira galdandi næsta ár.



*ÍF hevur roynt í ár, men tær hava barst ímóti vindinum. Kanska fer tað at ganga teimum betri næsta ár. Tá eru tær so mikið royndari...*

# Púra javnt í botninum

*Flogbóltur: Loksins eydnaðist ÍF at vinna á SÍ og við sigrinum eru liðini púra jøvn í botninum*

SVEINUR TRÓNDARSON

SÍ-ÍF 0-2

Fimti dysturin, sum varð leiktur hetta vikuskiftið var tann utsetti dysturin millum sørvingar og fuglfirðingar. Óðamannaverk var hjá fuglfirðingum at fara vestur tá illveðrið leikaði fyri kortum, og tí var hann avgreiddur nú ístaðin.

Úrslitið av dystinum var, at ÍF vann 2-0 á SÍ. Úrslitið hevur við sær, at liðini nú liggja púrasta jøvn í botninum og tað verður tann seinasti dysturin teirra millum, sum kemur at gera av hvat av liðunum endar niðast og hvat endar næstniðast.

### Skrædnað hjá SÍ

Tað er ikki hissini túrur, sum sørvingar hava tikið niður eftir stigatalvuni. Einu tíðina í fyrru helvt vóru teir á øðrum plássi, og tá vóru teir vandamiklir fyri øll liðini. Síðani endaspælið byrjaði hevur ikki gingið fyri fliðuna hjá teimum, og teir hava tapt og tapt.

Ilt er at siga hvør orsøkin er, men ein teirra er uttan iva, at leikararnir eru rættuliga spjaddir. Onkur lyklaleikari hevur verið til skips í seinastuni, og tað bøtir ikki um samanspælið tá so er.

Vit kunn í øllum førum staðfesta, at tað ikki er nóg mikið at vinna dystir í fyrru hálvu, tí tú missir helmingin av stigunum um jóltíðir, og tá farið verður undir endaspælið verður lættari hjá hinum at fáa fatur í tær aftur.

### ÍF fótar sær nú

Hjá fuglfirðingum hevur hetta árið verið ein marra. Meistaraliðið í fjør misti nærum alt liðið, og tí skuldi mestsum byrjast á berum.

Tað tekur tíð, at spæla eitt nýtt lið saman, og tað hava fuglfirðingar merkt. Ungu leikararnir hava sum oftast víst viljan at spæla, og til tíðir hevur tað eisini verið nóg mikið tá sterku liðini hava vitjað. Hetta fekk Mjølnir at kenna í heyst.

Royndirnar hjá Bjarna og Kenneth eru uttan iva tað, sum hevur borið liðið ígjøgnum hetta strævnað árið og nú sær tað út til at bera ávøkst.

Stuttligt verður tí at síggja, um tað fer at bera inn í næsta kappingarár við.



*Fuglfirðingar vunnu á sørvingum um vikuskiftið og um væl liggur fyri, kunnu teir smoyggja sær av niðasta plássi tá liðini hittast næstuferð*





*Heldur ikki Fleyr megnaði at steðga Mjølnir á vegnum móti meistaraheitinum, sum tær enn einaferð kunnu tryggja sær áðrenn kappingarári er liðugt leikt*

# Mjølnir vann aftur

*Flogbóltur: Mjølnirkvinnurnar gjørdu bart um vikuskiftið tá tær spældu moti Fleyr. Tær vunnu 2-0 og eru enn á beinari kós moti meistaraheitinum*

SVEINUR TRÓNDARSON

Mjølnir-Fleyr 2-0

Tað eydnaðist heldur ikki Fleyr at leggja Mjølnir forðingar á vegnum móti meistaraheitinum. Um vikuskiftið spældu liðini bæði í Klaksvík og har varð úrslitið — næstan sum væntað — at Mjølnir vann ein greiðan 2-0 sigur.

### Spenningurin burtur

Eins og í fjør, hevur tað ikki eydnast nøkrum av liðunum í kvinnudeildini at gera nakað við Mjølnir.

Gamaní var gongulagið ikki tað besta í fyrsta dystinum í ár, men síðani hevur eingin so mikið sum hótt dámurnar úr Klaksvík. Tær hava verið greiðir vinnarar í so at siga øllum dystunum tær hava leikt higartil í ár.

Einasta liðið, sum í løtuni kann — teoretiskt — hótta Mjølnir er TB, men so skal av álvara ganga av skriðuni hjá Mjølnir. Klaksvíksgenturnar eru fimm stig frammanfyri TB, og hóast tvøràgentur hava leikt ein dyst færri, eru ikki útlit til at tær kunnu forða fyri at enn eitt meistaraheitið fer til Klaksvíkar.

### Uppiborið

Tí er tað heldur eingin loyna, at tað er fult uppiborið, at Mjølnirkvinnurnar um ikki so langa tíð enn einaferð kunnu lata seg krúna til Føroyameistarar.

Tær hava víst størsta dirvið, besta álopsspæl og ikki minst eisini besta verjuspæl. Tí er valla nakar, sum fer at misunna teimum hetta meistaraheitið.

At Fleyr fór at taka stig frá Mjølnir var heldur ikki nakar, sum væntaði, serliga við tí spæli, sum Fleyr hevur víst í ár, í huga. Tær eru ongantíð komnar í hæddina, heldur ikki eftir at tær fingu nýggjan venjara.

Seinasta vikuskiftið vunnu tær á ÍF, men tann dysturin vísti eisini, at tað er eitt sindur millum topp og botn.

# Gudrid skal spæla um DM

*Danskur flogbóltur: Fortuna kvinnurnar skuldu vinna á ASV Århus fyri at koma í endaspæli, og tað gjørdu tær. Tí skulu Gudrid og tær spæla um DM heitið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Seinasta heyst stakk ein av bestu kvinnuligu flogbóltsleikarunum, Gudrid Nolsøe, í sekkin og fór til Danmarkar í lestrarørindum. Samstundis hevði hon gjørt av at royna kreftir við danskan toppflogbólt, og eftir stuttari tíð hevði hon fingið fótin fastan á fyrstaliðið hjá Fortuna úr Odense.

Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyskir flogbóltsleikarar gera seg galdandi í bestu deildini, men avrikið hjá Gudrid — og Bárði, sum spælir í sama felag — eigur at geva øðrum føroyskum leikarum blóð á tonna.

Neyvan hevði Gudrid hugsað fyri sær, tá hon fór, at hon seks mánaðir seinni skuldi vera við til at spæla um sjálvt DM heitið, men soleiðis er veruleikin nú vorðin.

### Fingu kravda sigurin

Um vikuskiftið spældu Fortunakvinnurnar móti ASV og hjá teimumvóru boðini greið. Ætla tit tykkum í endaspælið um meistaraheitið, so hava tit at vinna dystin móti ASV.

Av tí at ASV undan dystinum lá triðniðast átti tað ikki at gerast trupult hjá Gudrid og hennara liðfeløgum at vinna dystin, og so varð.

Hóast tær vóru eitt sindur kroystar í fyrra hálvleiki vunnu Fortunakvinnurnar dystin greitt 2-0 og við sigrinum tryggjaðu tær sær pláss í endaspælinum. Taparin í spælinum gjørdist HIK Ålborg, sum við 16 stigum — tveimum færri enn Fortuna — skal spæla endaspæl um einki.

### Spæla um einki

Hjá Alvildu Ólavsdóttir og Anniku Joensen hevur gingið rættiliga illa í hond í ár. Venjarin fekk sekkin tá ringast stóð til, og síðani er bert eydnast teimum at hála tveir sigrar heim. Hetta vikuskiftið spældu tær móti Gentofte, og tær taptu dystin ruddiliga 2-0.

Nú innleiðandi kappingin er liðug, er TV55 á næstseinasta plássi, og tær skulu tí vera við tí løgna endaspælinum um einki ...

Orsøkin til hetta er, at danska flogbóltssambandið hevur avgjørt, at landskappingin skal víðkast til 10 lið úr átta, og tí skulu tey fýra niðastu liðini bara spæla móti hvørjum øðrum um æruna. Neyvan nakað, sum fær spælararnar at gera sítt ítarsta, tí tað kann vera fullkomiliga líkamikið um tað verður vunnið ella tapt.

### Bárður í somu støðu

Mansliðið hjá Fortunu er í somu støðu sum TV55 kvinnurnar, tí teir liggja eisini næstniðast. Teir kundu við sigri á Skovbakken um vikuskiftið flutt seg upp á triðsíðsta pláss, men hvørki hugur ella vilji var til staðar skilja vit úr Odense.

Skovbakken vann greitt 2-0, men hjá teimum er støðan lítið mætari. Teir liggja nevniliga á triðsíðsta plássi og skulu spæla móti Fortuna tvær ferðir aftur í vetur, tá endaspælið um einki verður ...



*Gudrid Nolsøe, sum í fjør var við at vinna gull til Føroya á Oyggjaleikunum, skal nú berjast um DM heitið við liðfeløgum sínum úr Fortuna. Og Delta Seafood sleppur við ...*

# Fram ætlar sær silvurið

*Flogbóltur: Hóast flestu menninir eru ungir, eru teir knáir, og Fram dylir ikki fyri, at nú fyrstapláss er gloppið av hondum fara teir eftir silvrinum. Um vikuskiftið vunnu teir 2-0 á ÍF*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fram-ÍF 2-0

Fram ætlar sær silvur í ár, og um vikuskiftið gekk tað út yvir ÍF. Havnadreingirnir vunnu 2-0 á ÍF, og við sigrinum tryggjaði Fram sær eitt gott útgangsstøði til kappingina um annaðpláss, sum stendur við Mjølnir.

### Skuldu hava sigurin

Hóast tað vóru verandi meistararnir sum komu á vitjan í Eysturskúlanum, so var ikki annað væntandi, enn at Fram fór at tryggja sær sigurin.

Fram hevur havt gott tak á ÍF í ár, og teir eru serliga torførir at taka á heimavølli.

ÍF hevur, sum kunnugt, ikki somu styrki sum í fjør, og tí átti Fram at vinna henda dystin. Tað gjørdu teir eisini og tískil eru teir enn væl við í stríðnum um silvurmerkini.

### Góð framtíð

Tað er eingin loyna, at Fram seinastu árini hevur verið tað mest spennandi sum er hent føroyskum flogbólti. Hóast ungir eru fleiri teirra sjáldsama knáir, og teir smæðast ikki burtur millum stóru feløgini.

Hetta kappingarárið hevur kortini ikki verið av teimum bestu millum annað tí, at Rúni Weihe, sum hevur verið undangongumaður á liðnum, hevur drigist við drúgvan skaða. Slíkt merkist, tí Rúni er ein einari í føroyskum flogbólti.

Torført er at spæla liðið saman av nýggjum tá ein so týdningarmikil leikari ikki er við á sínum vanliga plássi og tað hevur eisini merkt fleiri av dystunum hjá Fram í vetur.

Kortini hava teir hingið í oddinum og tað er einki at ivast í, at teir fara at gera alt, sum stendur í teirra makt, fyri at tryggja sær silvurmerkini.



*Fram ætlar sær silvurmerkini nú tað ikki longur er teimum møguligt at fáa klørnar í gullmerkini. ÍF megnaði einki at gera við teir*